# Gudfrøðilig rák og vekingarrørslur í Føroyum og í Íslandi

Hans Andrias Sølvará

Vísindavøka, 24. september 2010

# Kristningin í Føroyum og Íslandi

- Ìsland og Føroyar kristnaði uml. 1000 e.Kr
- Kirkjurnar í miðøld áttu uml 45% av jørðini
- Siðaskiftið uml. 1540:
  - Kongur yvirtók 55% av jørðini í Føroyum, meðan restin var ogn hjá óðalsbóndum
  - Kongur yvirtók 19% av jørðini í Íslandi, meðan kirkjan framvegis hevði ræði á 30%
  - Føroyskt skriftmál doyði út í Føroyum, meðan tað varð varðveitt í Íslandi – sum kirkjumál – Føroyum 1939
  - Bíblian týdd til íslandskt í 1540/1584 – Føroyum 1949
  - Í Føroyum vóru tað danskir prestar og danskt mál, sum komu at ráða í kirkjuni, meðan tað í Íslandi vóru íslendskir prestar og íslendskt mál, sum ráddu

# Samfelagsligar treytir

- Fólkatalið vaks við fiskivinnusamfelagnum:
  - Í Føroyum úr uml. 5.000 í 1800 til uml. 15.000 í 1900 – t.e. trífaldaðist.
  - Í Íslandi úr 50.000 til knappliga 80.000 – t.e. minni enn tvífaldaðist.
- Í fyrsta triðingi av 1900-talinum fer fram ein ídning, t.e. motorisering av fiskiflotanum, sum setti stór krøv til havnarløg, bryggjur, smiðir, sleipistøðir og hentleikar av ymiskum slag á staðnum í londunum báðum
  - Fólkatalið í Føroyum var uml. 1935 30.000 í Føroyum og 110.000 í Íslandi – nýggj urban mentan – minni hierarkisk og meira leikmansvend - veksur fram, sum krevur nýtt heimspekiligt grundarlag
  - Í teimum nýggju býunum stóð kirkjan eisini veikast – serliga í Føroyum
- Stórar skipsvanlukkur í 1920- og 1930-árunum, ið fylgdu við fjarfiskiskapinum, har fiskimenn í ódnarveðri eisini javnan stóðu andlits til andlits við deyðan, skakaðu tann trúarliga grundvøllin og skaptu tørv á einum meira persónligum kristindómi, líkum honum, sum vekingarrørslurnar stóðu fyri .

# Kirkjurnar og sjálvstýrisstríðið

- Kirkjurnar hava røtur í landbúnaðarsamfelagnum, men tann íslendska var tættari knýtt at vanliga fólkinum – íslendskt leidd og mentanarliga/málsliga
- Sjálvstýrisstríðið tók seg upp í Íslandi í 1830-árunum, liðugt í 1918, meðan tað ikki kom fyri seg í Føroyum fyrr enn eftir 1900 – og tá nógv veikari enn í Íslandi
- Kirkjan í Íslandi gjørdist longu uml. 1850 partur av sjálvstýrisstríðnum, meðan hon fyri ein part kom í stríð við ta nógv veikaru føroysku sjálvstýrisrørsluna
- Íslendsku prestarnir útbúnir í Reykjavík síðan 1846

# Kirkjurnar og sjálvstýristríðið

- Íslendingar hildu, at Gud bara skilti íslendskt, meðan prestar í Føroyum so seint sum í 1894 róðu fram undir, at føroyskt í kirkjuni var synd
- Sterk luthersk fríkirkjurørsla í 1880-árunum, sum misti ávirkan í 1918 – kom ongantíð í Føroyum
- Fyrsta gudstænastan á føroyskum í 1902 (1855), men føroyskt kirkjumál varð ikki viðurkent fyrr enn í 1939
- Íslendska kirkjan var sjálvstýrispolitiskt progressiv, meðan tann føroyska var meira afturhaldssinnað

# Vekingarrørslur og aðrar rørslur

- M.a. hesar rørslur komu til Íslands og Føroya:
  - Mormonar (Ísland í1851)
  - Katolikkar (1850-árunum)
  - Adventistar (Íslandi og Føroyum í 1893)
  - Lutherskar fríkirkjur (Íslandi í 1899)
  - Brøðrasamkoman (Føroyum í 1865 og í Íslandi í 1897)
  - Heimamissiónin (Íslandi í 1901 og í Føroyum í 1904)
  - Spiritisman (Íslandi uml. 1900)
  - Hvítusunnusamkoman (Føroyum og íslandi í 1920-árunum)
  - Frelsunarherurin (Føroyum og íslandi í 1920-árunum)
  - Skandinavisma og grundtvigianisma fingu minni týdning í Íslandi enn í Føroyum, meðan liberala gudfrøðin (spiritisman) fingu stóra ávirkan í Íslandi
  - Gongdin móti størri trúarligum fjølbroytni/sekularisering í Íslandi hendi fyri ein stóran part innan fyri kirkjuna, meðan hon í Føroyum fyri ein stóran part hendi uttan fyri kirkjuna
  - Hví?

# Undirtøka hjá trúarbólkum

## Undirtøka hjá trúarbólkum í Føroyum:

| Trúarsamfelag | | Tal av limum og % av fólkatalinum |
|---|---|---|
| | | 1990 |
| Fólkakirkjan | | 38.229 (80,8%) |
| Harav eru innan fyri kirkjuna við sjálvstøðugari fyrisiting: | | |
| Heimamissiónin | 3.536 (7,4%) | |
| Kirkjuliga missiónsfelagið | 287 (0,6%) | |
| Brøðrasamkoman | | 5.448 (11,4%) |
| Hvítusunnusamkoman | | 717 (1,5%) |
| Adventistar | | 96 (0,2%) |
| Frelsunarherurin | | 96 (0,2%) |
| Katólska kirkjan | | 96 (0,2%) |
| Jehova vitnir | | 75 (0,2%) |
| Mormonar | | (0,0%) |
| Ba´ha´i samfelagið | | (0,0%) |
| Onnur trúarsamfeløg | | 116 (0,2%) |
| Uttan trúarsamfelag | | 1625 (3,4%) |
| Einki upplýst | | 908 (1,9%) |
| Tilsaman | | 47.787 (100%) |

# Undirtøka hjá trúarbólkum

## Undirtøka hjá trúarbólkum í Íslandi:

| Trúarsamfelag | Tal av limum og % av fólkatalinum | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | 1930 | 1960 | 1980 | 1998 | 2010 |
| Fólkakirkjan | 98.899 (90,8%) | 160.882 (91,7%) | 213.147 (93,2%) | 246.012 (90%) | 251.487 (79,2%) |
| Lutherskar fríkirk. | 8.470 (7,8%) | 10.750 (6,1%) | 8.700 (3,8%) | 10.007 (3,6%) | 16.497 (5,2%) |
| Katólska kirkjan | 191 (0,2%) | 897 (0,5%) | 1.614 (0,7%) | 3.513 (1,3%) | 9.672 (3,0%) |
| Adventistar | 421 (0,4) | 533 (0,3%) | 659 (0,3%) | 723 (0,3%) | 770 (0,2%) |
| Brøðrasamkoman | 68 (0,1%) | 75 (0,04%) | 56 (0,03%) | 49 (0.02%) | 62 (0,02%) |
| Hvítusunnusam. | 7 (0,01%) | 530 (0,3%) | 691 (0,3%) | 1.349 (0,5%) | 2.109 (0,7%) |
| Jehova vitnir | - | 56 (0,03%) | 319 (0,1%) | 616 (0,2%) | 693 (0,2%) |
| Ásatrúgvin | - | - | 67 (0,03%) | 301 (0,1%) | 1.403 (0,4%) |
| Ba´ha´i samfelagið | - | - | 227 (0,1%) | 425 (0,2%) | 398 (0,1%) |
| Mormonar | | - | - | 171 (0,1%) | 182 (0,06) |
| Krossurin | - | - | - | 542 (0,2%) | 630 (0,2%) |
| Vegurin | - | - | - | 721 (0,3%) | 687 (0,2%) |
| Buddistar | - | - | - | 349 (0,1%) | 880 (0,3%) |
| Muslimar | - | - | - | 89 (0,03%) | 591 (0,2%) |
| Onnur trúarsam. | 24 (0,2%) | 37 (0,2%) | 587 (0,3%) | 4.664 (1,7%) | 19.649 (6,2%) |
| Uttan trúarsam. | 781 (0,7%) | 1.920 (1,1%) | 2.727 (1,2%) | 5.746 (2,1%) | 10.336 (3,3%) |
| | | | | | |
| Tilsaman | 108.861 (100%) | 175.680 (100%) | 228.794 (100%) | 275.277 (100%) | 317.630 (100%) |

# Adventistar í Føroyum

- Lukas Debes nevnir í 1673 mann úr Gjógv, Jacob Olesön, sum í 1667 fekk stóra undirtøku fyri at halda leygardagin heilagan:
  - "*Rygtet er udspredt over alle Øerne udi alle Menigheder, og tog det gemene Folk meget efter, særdeles Tjeneste-Tyende, for ledige Dage Skyld og begyndte paa mange Steder at holde Löverdags Helligen*".
  - Lukas Debes, sum sigur frá hesi søguni undir yvirskriftini "*Om Spøgelser og Satans Anfægtelser udi Færø*", skrivaði víðari, at til alla lukku gjørdi Jacob Olesön seg árið eftir sekan í "*Horeris Synd*", sum hevði við sær, at hann misti alla undirtøkuna millum fólkið.
  - Í tingbókini sæst, at Jacob Ollesøn úr Gjógv á Vártingi í Eysturoy 2. apríl 1668 "*for Lejelsmaal med Maren Hans (Datter) begge deres første Forseelse, blev ... dømt at bøde for dem begge til H. K. M. 2 Mk. Sølv*".
- Onkuntíð eru vit frammanfyri íslendingar ☺
- Adventistarnir sterkir í Íslandi fyrst í 20. øld, men mistu skjótt nærum alla undirtøkuna til luthersku fríkirkjuna í Reykjavík – ½ limir uml. 1910

# Brøðrasamkoman

- Kom til Føroya við William G. Sloan í 1865
  - Fyrsti dópurin í 1880 í Havn, har samkoman í 1901 hevði nærum allar sínar 30 limir (0,2%)
  - 1911 hevði samkoman 197 limir (1,09%)
  - 1917 var fyrsti dópurin á í Klaksvík
  - 1921 hevði brøðrasamkoman 550 limir í (1,52%)
  - 1950 verður mett, at brøðrasamkoman hevði undirtøku frá 10% av fólkinum – 30% í Klaksvík

# Stinutátturin frá 1917

- Vit hava fingið nýggjan prest,
- Hann doypir niðri við Nótaneyst

- Niðurlag:
- “Det er fuldbragt, det er fuldbragt”,
- Einki annað fekk Stina sagt

- Andrew og Stina ganga hond í hond,
- tey vænta sær at síggja ta Heiløgu Ond

- Stina vóð upp undir vel,
- Har sá hon tó bara eina øðuskel

- Og hví ikki tað, og hví ikki tað,
- Og hví skal Stina ikki fáa bað

# Brøðrasamkoman

- Kom til Íslands við Frederic H. Jones í 1897
- Á Akureyri var ein samkoma sett á stovn í 1905 av bretska trúboðaranum Arthur Gook, sum í 1926 fekk almenna støðu sum átrúnaðarligt samfelag:
  - Í 1935 (tá brøðrasamkoman í Føroyum kanska hevði fingið undirtøku frá uml. 10% av føroyingum, t.e. frá uml. 3.000 fólkum av 30.000 fólkum, hevði samkomuleiðarin á Akureyri, Arthur Gook, sum virkaði har í fleiri áratíggir, tilsamans endurdoypt 147 íslendingar - tá var fólkatalið uml. 110.000 í Íslandi (í 1921 vóru 550 brøður í Føroyum)
  - Í 1930 hevði samkoman 68 limir
  - Í 1960 hevði samkoman 75 limir
  - Í 1998 hevði samkoman 49 limir
- Á Ísafjørðinum var samkoma stovnað í 1911 av James Nisbet:
  - Í 1914 vóru 13 mans endurdoyptir
  - Samkoman datt niðurfyri eftir nøkur fá ár

# Gook doypir á Akureyri í 1908



# Fólkagrundarlag

- Sambært Pétur Pétursson vóru tað í Íslandi mest fiskimenn og arbeiðsfólk, sum savnaðust í brøðrasamkomuni og øðrum vekingarrørslum, ið ongantíð fingu nakra serliga undirtøku, meðan handils- og yvirstættin - serliga í Reykjavík - svanaðist kring spiritistisku rørsluna
- Sambært Josias Matras var "*En betydningsfuld faktor … at J. F. Kjølbro, den største arbejdsgiver i bygden, var baptist, og i første række gav arbejde til dem, der hørte til baptistmenigheden*" – um støðuna í Klaksvík í 1920- og 1930-árunum, eftir at Kjølbro varð doyptur

# Samanbering

- Brøðrasamkoman og heimamissiónin mentist í Føroyum í 1920- og 1930-árunum, eftir at trúboðarirnir gjørdust føroyingar og fóru at tosa føroyskt:
  - Andrew Sloan og Victor Danielsen (Gamli Sloan doyði í 1914)
  - Alfred Petersen varð settur sum trúboðari í Føroyum í 1919
  - Fyrsta sálmabók brøðranna á Føroyskum í 1920 – føroysk bíblia í 1949
  - Fyrsta missiónssangbókin á Føroyskum í 1937 – tann kirkjuliga kom í 1961
  - Jákup Dahl týddi kirkjuligu ritualini í 1918 – vórðu autoriseraði í 1930
  - Farið var at missionera umborð á skipunum í 1920-árunum
- Brøðrasamkoman í Íslandi fekk ongantíð fótin fyri seg, meðan heimamissiónin ikki fekk nakra undirtøku fyrr enn í 1930-árunum, hóast tað var ein íslendingur, Sigurbjörn A. Gislason, sum í 1901 fekk ta truplu uppgávuna at bera boðskapin fram í íslandi: "*Gíslason ... did not succeed in establishing an Inner-Mission Society in Iceland. His work suffered from the "Danish" label frequently used by his opponents*" – staðfestir Pétur Pétursson professari í doktararitgerð síni:
- Spiritisman, sum ongantíð fekk fótin fyri seg í Føroyum, mentist fyri ein stóran part innanfyri kirkjuna í Íslandi - skiftisfyribrigdi
  - Skal hava havt einar 1200 limir seinast í 1930-árunum
  - Gjørdist íslendsk fólkatrúgv – við gróðrarbotni í íslendsku sagamentanini

# Niðurstøða

- Íslendska kirkjan, sum mentanarliga var íslendsk, lagaði seg orsakað av sterku sjálvstýrisrørsluni í 1850-árunum longu áðrenn vekingarrørslurnar í seinnu helvt av 1800-talinum komu til Íslands eftir (sekulerum) íslendskum viðurskiftum
- Føroyska kirkjan, sum mentanarliga var donsk, lagaði seg ikki til føroysk viðurskifti, áðrenn vekingarrørslurnar komu, tí tjóðskapar- og sjálvstýrisrørslan bæði kom seinnni til Føroya og stóð nógv veikari/spjaddari í Føroyum enn í Íslandi